

# Statoil og Statkraft byggja risa vindmylnulund í Bretlandi

Deil:

Jan Müller

06.07.2014 - 15:17

Oljan.fo

Statoil er millum heimsins fremstu orkufyritøkur, tá tað snýr seg um at byggja út við varandi orku. Hetta er seinasta útbyggingin í Bretlandi eitt gott dømi um.

Statoil og almenna norska orkufelagið Statkraft skulu byggja eina risastóra vindmylnulund til havs út fyri Bretland. Samlaði kostnaðurin er mettur til 14 mia. kr.

Norska Statoil, sum í hesum døgum borar 9. brunnin á føroyska landgrunninum, tekst ikki bara við olju og gass. Fyritøkan man teljast millum tær fremstu í heiminum, tá tað snýr seg um at menna og útbyggja varandi orkukeldur.

Saman við Statkraft fer Statoil nú undir at byggja vindorkulundina Dudgeon, sum liðug fer at veita 410.000 bretskum heimum orku. Nú verða lagdir kaðalar, og transformatorstøð verður bygd á landi.

Hetta er í tráð við stigvísa kommerciella ætlan okkara  at nærkast útbygging av varandi orkuframleiðslu sigur konsernstjórin hjá Statoil, Eldar Sætre.

Sjálvt útbyggingin til havs byrjar í 2016. Statoil brúkar ma. drúgvu royndir sínar á olju- og gassøkinum til at byggja hesa stóru vindmylnulundina til havs.

Samlaða íløgan í Dudgeon er umleið 15 mia. kr. Parturin hjá Statoil er mettur til 5,5 mia.

“Vit eru væl nøgd við at vit nú hava kunnað tikið støðu til verkætlanina. Hetta styrkir og sannar strategisku støðuna hjá Statoil og ynskini um stigvísan og lønandi vøkstur sum ein týðandi leikari innan havvind,” sigur Siri Espedal Kindem, sum stendur á odda fyri havvindsverkætlanum og varandi orkuútbyggingini hjá Statoil.

**Statoil og Statkraft lótu í 2012 upp ta fyrstu norsku havvindlundina út fyri bretsku strondina. 88 vindmyllur vórðu settar upp í Sheringham Shoal. Hesar framleiða orku til 220.000 húsarhald í Bretlandi.**